UTTAN ÚR HEIMI

## Deyðar kvinnur valdar á ting

Pakistanska løgreglan er farin undir at kanna, hvussu tað kann bera til, at tvær deyðar kvinnur eru valdar í eitt landspartating.

Løgreglan sigur, at onnur kvinnan doyði fyri 13 árum síðani, men at hon kortini fekk nóg nógvar atkvøður til at sleppa í tingið í Dir-landspartinum. Hin kvinnan, sum varð vald í tingið, doyði fyri trimum árum síðani.

Ákæruvaldið sigur, at teir veljararnir, sum brúktu teir ólógligu atkvøðuseðlarnar, kunnu enda í rættinum. Eygleiðarar halda, at valúrslitið skal tulkast sum eitt mótmæli, eftir at landspartamyndugleikarnir fyrr í ár bannaðu kvinnum at stilla upp og at velja. Men landsmyndugleikarnir ógildaðu avgerðina, og tað fekk fleiri hundrað kvinnur at fara á val í Dir-landspartinum, skrivar AP.

## Undir eftirliti

Svenska stjórnin hevur gjørt av at eftirlíka einum amerikonskum ynski um at halda eygað við einum svenskum ríkisborgara, sum hevur sitið fangi í Guantanamo.

Tá Mehdi Ghezali slapp úr fangaleguni í Kuba í juli í fjør, segði svenska stjórnin, at amerikanararnir høvdu ikki fingið nakað lyfti um, at sviar skuldu halda eygað við honum. Leila Freivalds, uttanríkisráðharri, segði tá, at stjórnin kundi heilt einfalt ikki geva amerikanarunum eitt tílíkt lyfti.

Men sambært tí, sum kom fram í einari sending hjá sjónvarpinum TV4 fyrrakvøldið, hevur svenska stjórnin slakað. Tað kom fram, at sviar hava lovað at siga amerikanarunum frá, um Mehdi Ghezali biður um nýtt pass. Sambært sendingini hava sviar eisini lovað at siga amerikanarunum frá, um maðurin fer av landinum, og ber tað til at fáa upplýst, hvønn hann fer at vitja, fáa amerikanararnir eisini tað at vita.

## Robin Hood deyður

Amerikanska samveldisløgreglan FBI hevur skotið leiðaran í frælsisrørsluni í Puerto Rico, Filiberto Ojeda Rios. Hann var 72 ára gamal.

Tann 12. september í 1983 rændu hann og nakrir aðrir meiri enn sjey milliónir dollarar frá einari amerikanskari fyritøku. Pengarnar brúktu teir til at fíggja frælsisbardagan og til at hjálpa teimum fátæku, og tað gjørdi, at fólk í Puerto Rico sammettu frælsismannin við Robin Hood.

Fimm ár eftir ránið varð Rios tikin, men hann slapp leysur ímóti loysigjaldi. Trý ár seinni varð hann aftur tikin, og hesaferð fekk hann 55 ára fongsul, men tað eydnaðist honum at flýggja longu tvey ár eftir dómin. Nakað seinni viðgekk hann, at hann hevði verið við, tá ellivu amerikonsk flogfør vórðu sprongd í luftina á einum hernaðarflogvølli í Puerto Rico.

Síðani hevur FBI leitað eftir honum, og fyri nøkrum døgum síðani kom samveldisløgreglan fram á hann. FBI vil vera við, at Rios doyði í skotbardaga við løgreglumenninar, men í Puerto Rico er eingin í iva um, at FBI-menninir høvdu fingið boð um at skjóta hann.

## Nú hevur hann 13 konur

Kongurin í Swazilandi, Mswati, er nú vorðin giftur fyri trettandu ferð. Tann seinasta brúðurin var tann bara 17 ára gamla Prindile Nikambule.

Mánadagin varð tann nýggja konan víst almenninginum, men tað vóru minni enn so øll, ið vóru líka fegin um giftuna. Kvinnufelagsskapir skipaðu fyri mótmælisgongum, tí kvinnurnar vilja vera við, at levnaður kongs er ósambæriligur við tann veruleika, at ongastaðni í heiminum eru so nógv fólk smittað við eyðkvæmi sum í Swazilandi. Sambært ST eru meiri enn 40 prosent av øllum teimum tilkomnu har smittað.

Men Mswati, kongur, vísir atfinningunum aftur. Hann sigur, at tað at hava fleiri konur er við til at sameina tjóðina.

# Mótmæltu uttan fyri Hvítu Húsini

*Cindy Sheehan misti sonin í Irak í fjør. Her verður hon tikin uttan fyri Hvítu Húsini.*



**Umleið 370 fólk vórðu tikin, tá tey gingu mótmælisgongu í Washington ímóti krígnum í Irak**

MÓTMÆLI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Løgreglan var væl mannað, tá umleið 600 fólk gingu mótmælisgongu uttan fyri Hvítu Húsini fyrradagin ímóti Irak-krígnum. Talsmaðurin hjá Bush, forseta hevði boðað frá framman-undan, at stjórnin letur seg ikki ávirka av mótmælunum, men mótmælisfólkini gjørdu í hvussu er sítt til at ávirka forsetan og stjórnina.

- Allur heimurin fylgir við, róptu tey, og nakrar kvinnur bóru eitt stórt skelti við orðunum "Kríggj er ósømiligt".

Løgreglan gjørdi av at spjaða mótmælisgonguna, og tá fólk ikki vildu fara við góðum, vórðu umleið 370 teirra tikin. Teirra millum var Cindy Sheehan. Hon gjørdist kend um allan heimin í summar, tá hon setti seg uttan fyri bústaðin hjá forsetanum í Texas og kravdi at sleppa at tosa við Bush. Cindy Sheehan misti sonin í Irak í fjør.

Leygardagin gingu umleið 100.000 mótmælisgongu í Washington við kravi um, at USA og Bretland skulu taka sínar hermenn úr Irak. Men USA fer ikki at gera eftir kravinum, segði Scott McClellan, talsmaður hjá Bush mánadagin.

# Neyðhjálp til Sri Lanka ikki til tey neyðstøddu

**Men fólk, sum ikki vórðu rakt av flóðalduni, fingu hjálp**

NEYÐHJÁLP
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Um allan heim, eisini í Føroyum, lótu myndugleikar, felagsskapir og einstaklingar teimum neyðstøddu eftir flóðalduna í Landssynningsasia hjálp, men nú vísir tað seg, at í summum førum kom neyðhjálpin ikki teimum neyðstøddu til hjálpar.

Í gjár kunngjørdi ríkisgrannskoðarin í Sri Lanka eina frágreiðing um hjálpina, sum landið fekk aftan á flóðalduna. Hann skrivar millum annað, at fólk, sum als ikki vórðu rakt av flóðalduni fingu pengar, meðan fólk, sum mistu hús og heim, fingu ikki eitt oyra.

Sambært ríkisgrannskoðaranum komst hetta av, at landsmyndugleikarnir vóru í iva um, hvussu teir skuldu býta pengarnar, men hann leggur dent á, at talan var ikki um svik ella nakað annað ólógligt.

Grannskoðarin nevnir sum dømi, at í einum føri vórðu 4,5 milliónir krónur býttar ímillum 16.000 húski á srilankisku vesturstrondini, men at í hesum økinum vóru tað bara 599 húski, sum vórðu rakt av flóðalduni.

# Illveður kravt fleiri mannalív

Í gjár herjaði melduródnin Damrey í Vietnam. Myndugleikarnir høvdu flutt umleið 300.000 fólk burtur frá strondini, áðrenn ódnin kom í land, men hermenn fingu boð um at halda eygað við byrgingunum, sum skuldu forða fyri flóðaldum. Men vónirnar vóru ikki tær bestu, tí byrgingarnar er ikki ætlaðar til so ringt veður.

Damrey herjaði mánadagin kinesisku oynna Hainan. Har høvdu myndugleikarnir flutt 200.000 fólk undan ódnini, men kortini kravdi hon níggju mánnalív. Kinesisku myndugleikarnir søgdu í gjár, at stór øki á oynni stóðu undir í sjógvi, og at Damrey hevði gjørt skaða fyri einar sjey milliardir krónur.